# Visjón og traditión

JÓGVAN VIÐ KELDU
Fólkaflokstingmaður í Norðoyggjum



**Okkara holla og bókliga vælútbúna fólk eigur framvegis at koma við ráðum, men givið er, at hugsast skal um, at visjónir bert geva úrslit, um tær samfelt eru tengdar at strategi og arbeiðsmentanarligum veruleikum.**

Tað er við ávísum spenningi fylgt hevur verið við frágreiðingum frá strategibólkum í samband við visjón 2015. Ein visjónsætlan er altíð bæði viðkomandi og neyðug.

Menning av einum landi, kanska serstakliga lítlum landi, er samansjóðing av visjón, strategi og ikki minst arbeiðsmentan við royndum. Hetta verður okkara vinnu- og handilslív konfronterað við hvønn einasta dag.

Hesir tríggir grundstólpar gera samfelt, at nýhugsan við visjón hevur botn í veruleika, at strategi verður bygd á traditión og, at arbeiðsmentan fylgir hesum upp.

**Tað vit eru góð til**

Fyri nú mongum árum síðani fór stóra oljufelagið Exxon at selja og marknaðarføra teldur, so meira kundi fáast burturúr. Hetta gav satt fíggjarligt bakkast. Teir vóru noyddir at gevast. Orsøkin var, at teir ætlaðu at reka teldufyritøkuna á sama hátt sum oljufyritøku. Um somu tíð fór kenda amerikanska elektronikkfelagið RCA at ráðgeva í fíggjarátøkum og at leiga bilar út. Úrslitið segðist, at stjórnarskrivstovurnar fingu nakrar løgnar musikalskar skrivstovustólar, ónøgdar meðarbeiðarar og vinningurin fekk álvarsamt skot niðureftir. Her var betri at flýggja enn at falla.

Føroyar hava seinastu árini fingið fólk við hollari bókligari útbúgving aftur úr útlond-um, úr t.d. Keypmannahavn og London. Mong hava fingið føst størv á almennum skrivstovum. Hesi fólk eru komin landi okkara væl við á meiri enn ein hátt.

Hinvegin er tað kent um allan heim, at tað eru einstaklingaavrikini, sum gera munin. Her kundi verið nevndir eitt ótal av einstaklingum, sum fullkomiliga broyttu okkara lívsmynstur. Liðavrik er ikki júst tað, ið hevur hepnast best hjá okkum.

**Eingin veit alt**

Fyri 40 árum síðani var sagt av einum kapasiteti innan fiskivinnuna, at "saltfiskur er ein saga blot", aðrir fiskimenn, sum eg hevði og framvegis havi stóra respekt fyri, søgdu um somu tíð, at "útróður verður eingin eftir um 20 ár". Hesar útsagnir eiga at siga okkum nakað, tær kunnu ikki bara kveistrast til viks.

Fyri stuttum las eg grein í danska blaðnum Eksport-fokus um menningina í Estlandi á KT-økinum, at røturnar til projektið Skype, sum varð selt fyri tvítals milliarda upp-hædd til USA, júst vóru í hesum landi. Hyggur tú víðari eftir orsøkini, vísir tað seg, at við hollari útbúgving saman við eini traditión innan KT-vinnuna heilt aftur í sovjettíðina, hava hesir lagt seg í oddin. Traditiónin telur meira enn vit mangan hugsa.

**Lurti eftir Óla**

Umráðandi er, at vit byggja á ta traditión vit hava, at vit kanna og granska innan fiski-vinnu, samstundis sum vit brúka tíð til at víðka okkum til aðrar tættir. Tí taki eg so hjartaliga undir við Óla Jacobsen, formanni í Fiskimannafelagnum, at skulu broyting-ar gerast, skulu tær gerast við skili og yvir ikki einans trý ár, men yvir eitt nógv longri tíðarskeið. Avtøka av ymiskum afturberingum til fiskivinnuna er ikki einføld.

Nú veit eg ikki, hvussu harðliga Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum meinti tað sum hann segði, tí ein kann fáa varðhugin av, at sum skjótast "fáa studningin avtiknan, føroyingar í land so hesir gera annað arbeiði og útlendingar at manna skip og bátar", tí samstundis er komið fram, at fáa ein opnan arbeiðsmarknað millum Føroyar og ES. Vit skulu hava í huga, at um kanska ikki so nógv ár, verður Turkaland limur ES. Við hesum landinum koma trupulleikarnir at økjast í stórum. Latið okkum vera varðin.

Jan Mortensen segði fyri tíð síðani, at "føroyingar hava tað, at teir fara fram til krossveg, hyggja báðar vegir men fara hvørgan". Hetta er væl sagt. Møguliga tí vil hann koma við nøkrum, sum fullkomiliga brýtur av frá hesum veruleika. Men haldi, at Jan er farin nakað langt í sínum útsagnum, tí er tað hetta hann meinar, er tað harmiligt, vandamikið og veruleikafjart.

Sjálvandi skal okkara holla og væl útbúnað fólk koma við ráðum, men givið er, at hugsast skal um, at visjónir bert geva úrslit, um tær samfelt eru tengdar at strategi og arbeiðsmentanarligum veruleikum.

# Hvør er illoyalur, nær?

SÚSANNA DAM



Loyalur, sambært orðabókina merkir hetta, trúgvur, ærligur, heiðurligur, hollur ella dyggur.

Loyalitetur merkir trúskapur. Ískoytið il- er útlendskt fyri føroyskt ó-.

Hvørki orðabókin ella grundlógin siga nakað um, hvørjum ein skal vera loyalur móti, ei heldur verður nevnt, um loyalitetur merkir óavmarkaður trúskapur móti ávísum persóni tí at persónurin, hevur ta valdsstøðuna, hann hevur, ella um ein letur trúskap sín eftir sínum egna morali og sannføring. Helst er tað soleiðis, at flestøll í okkara parti av heiminum meta seg, at hava frælsi til at velja hvørjum fólkum ella hvørjum idealum ein er loyalur ímóti, og í hvussu so er, gera flestokkara sjálvi av, hvussu langt loyaliteturin røkkur, uttan at hesin loyalitetur afturfyri rakar okkara livibreyð.

Tó sýnist, sum spurningurin ikki er heilt greiður tá á stendur. At vísa seg ber til, at reka fólk av garði vegna illoyalitet, um ein gongur yvirvøldini ímóti. Søgan, sum hon varð søgd um dagarnar, sýndi annars ein sera loyalan skattaborgara, sum ikki hevur gjørt annað enn at verja støðu skattaborgarans ímóti eyðráni yvirvaldsins.

Skattaborgarin sá dagsins ljós einaferð í fornøldini tá onkur snildur herhøvdingi fann uppá, at fáa bøndurnar at fíggja krígsførslu sína, soleiðis at hann sjálvur og hermenn hansara kundu tíggja sær, sum teimum lysti uttan fíggjarligar avmarkingar.

Meginreglan við skattaútskriving nú á døgum er hin sama sum tá. Sjálvt um herførarin fór higani fyri fleiri túsund árum síðani, so hevur eftirtíðin støðugt fostrað nýggjar skattauppkrevjarar, og nýmótans herførarin skal eisini nýta pening til at tryggja valdsstøðu sína. Hansara kríggj verða enn fíggjað við skattapeningini, alt fyri at menna og betra umstøður skattaborgarans verður sagt, men ikki minst fyri at tryggja teir sjálvar.

Í okkara nýmótans fólkaræði róptu høvdingarnir annars nógv um gjøgnumskygni og opinleika, men tað var beint áðrenn valið, og átti, sum so mangt annað skattaborgarin hevur lagt oyrað til, ikki at takast fyri fult.

Gjøgnum øldirnar er skattaborgarin vorðin gamal, blindur og deyvur, nærum málleysur, men tó ikki heilt býttur. Onkuntíð rakar hann við okkurt, sum hann veit ikki er, sum tað eigur at vera.

Nútíðar herhøvdingin er ikki verjuleysur, minni enn so. Men hjá okkara ávísa høvdinga má bland vera komið í vápnini, at nýta loyalitet var tápuligt, hóast tað sýnist sum høvdingin hugsaði seg eitt sindur um, tí hann tordi ikki at nýta føroyska orðið trúleysur, men segði illoyalur, kanska so at skattaborgarin ikki skuldi skilja tað, ið sagt varð.

Eftir stendur at søgan kann ikki enda her, um vit nú ímynda okkum at skattaborgarin umsíður hevur fingið áhuga fyri hvussu eitt opið og gjøgnumskygt rættarsamfelag loysir sínar ivaspurningar. Tí er bert eftir at vóna, at ÚF, sum segði søguna, ikki verður sløkt vegna illoyalan tíðindaflutning.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

## Landbúnaðurin hevur hóast alt megnað tað sum tað almenna enn ikki hevur megnað:

# At rinda blokkin aftur haðani hann kemur

BJØRN PATURSSON
nevndarformaður, Bóndafelag Føroya



Eingin er fegin um at taka ímóti studningi. Og flestu eru samd um, at studningur er ikki besta loysnin í vinnuligum høpi. Men soleiðis, sum strukturin og skipanirnar í landbúnaðinum eru vorðnar, kann ikki krevjast at føroyski landbúnaðurin skal klára seg í kappingini við innfluttar landbúnaðarvørur, sum í flestu førum fáa fleirfaldt tann stuðul, sum føroyski landbúnaðurin fær úr landskassanum.

Hetta hava vit fleiri ferðir áður víst, á og hetta er neyvan nakað nýtt fyri flestu. Men tað sum higartil bert hevur verið ein póstandur er nú prógva-, nevniliga at:

Landbúnaðurin rindar allan studningin aftur haðani hann kemur, til landskassan!

**Hetta er nú prógv svart upp á hvítt**

Hetta hevur óhefti búskaparfrøðingurin Magni Laksafoss nú prógvað. Við øðrum orðum kann sigast, at føroyski landbúnaðarstuðulin fyri tað mesta er stuðul, ið kemur føroyska brúkaranum beinleiðis til góðar, tí at matvørurnar eru bíligari at keypa.

**Netto gjaldstreymurin kortlagdur**

Av tí at landbúnaðarstudningurin í fleiri førum er skorðin niður ella hevur staðið í stað er støðan broytt frá at landbúnaðurin í 1990 fekk (netto) 12,5 mill. kr í studningi, til at landbúnaðurin í 2005 (netto) so at siga, rindaði allan studningin aftur í landskassan haðani hann kom.

Støðan broytist alla tíðina og eg eri sannførdur um, at vóru talvurnar í kanningini hjá Magna Laksafoss dagførdar við tølum frá 2006 høvdu vit sæð, at landbúnaðurin rindar meir til landskassan enn hann fær.




**Ungar váðafúsar familiur taka við**

Landbúnaðurin stendur fyri lutfalsliga stórum strukturbroytingum í hesum døgum. Krøvini til matvøruframleiðslu bara herðast, og trýstið á matvøruprísirnar gongur bert ein veg. Skulu tey sum starvast innan hesa vinnu megna at fylgja við tøkniliga og fíggjarliga er avgjørt ikki brúk fyri slíkum hóttanum og óstabiliteti sum hesin strategibólkurin borðreiðir við. Heldur hinvegin. Skulu vit rokna við at ungar kreftir vísa landbúnaðinum áhuga, er avgjørt neyðugt at karmarnir um vinnuna eru stabilir og dagførdir soleiðis at ábyrgd, váði og rættindir fylgjast at.


Lesið Sosialin so eru tit við